# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður at kæri maður mín,
okkara góði pápi, abbi og langabbi

**Poul Johannes Zachariassen**
ættaður av Sandi (á Sondum)
búsitandi í Havn

andaðist í heiminum 11. sept. 86 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
mikudagin 16. sept. Kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Frida, Marit og Kristbjørg**

Tey, sum ynskja at senda blómur ella kransar kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Javna, konta í peningastovnunum

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verfaðir
og abbi okkara



**Carl *Matthias* Frits Hansen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini. Tøkk til prest Hanus á Gørðum fyri góð og troystarrík orð, tøkk til kirkjutænarar, urguleikara, berarar og sangarar.
Tøkk til heimahjálpirnar ta tíðina hann búði heima.
Ein serstøk tøkk til starvsfólkini í Uppistovu og á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, fyri umsorgan og góða røkt ta tíðina hann var hjá tykkum.
Ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk við Sálmi 68: vers 20

*Lovaður verið Harrin dag eftir dag;*
*Verða byrðar lagdar á okkum,*
*er Gud frelsa okkara. – Sela.*

**Henny**
**Synnøva, Kristian og Sigmund**

# Til lukku Sólrun!

Undarligt at hugsa sær at nú 18. september verður Sólrun "lærarindan" 60 ár. Altso Sólrun Luid.

Sólrun er fødd og uppvaksin á Tvøroyri, og tá hetta skúlaárið er liðugt, hevur Sólrun starvast í Tvøroyra skúla í 38 ár. Tað eru ikki 38 dagar. Havi sjálv havt Sólrun til lærara, nú eru vit starvsfelagar, og longu tá, í 1973, vísti Sólrun síni kreativu evnir, gjørdi undirvísingina og dugdi at fáa øll við.

Sólrun er gift við Annfinni Luid, og eiga tey sonin Hjørleif. Annfinnur er ættaður úr Hovi, og hava tey gjørt barnaheimið hjá Annfinni í stand soleiðis, at tey nú kunnu verða í síni frítíð í Hovi, sum teimum dámar so væl. Tí – er tað nakað, sum tey tíma, so er tað at røkja seyðin og gæsnar. Tað gera tey eisini fyrimyndarliga.

Kirkjan hevur eisini altíð havt eitt stórt pláss í hjartanum á Sólruni, og stuðlar hon hvønn sunnudag, antin Hovs ella Tvøroyra kirkju, við síni vøkru songrødd.



Stuttligt er at vitja Sólrun og Annfinn, tey eru gestablíð og væl sæst, hvussu røkin fólk tey eru, og hvussu góðar hendur bæði hava. At Sólrun er ein kreativur persónur, vita flestu innan skúlan, manglar tú okkurt hugskot til Handaverk og list, so er bara at spyrja Sólrun. Stór gleði er eisini at fara í skúlagarðin til jólar og síggja nissulandið, ið Sólrun gongur so høgt uppí at gera við sínum næmingum, og mong gomul hevur hon glett, tá hon hevur verið við næmingum á Suðuroyar ellisheimi og gingið Lusiu.

Sólrun hevur nógv, hon kann takast við, nú hon er farin í niðursetta tíð, og henni dámar tað, hon ger, men hóast tíðin hjá henni nokk ikki slær til, so eru vit fleiri, ið vóna, at Sólrun fer at taka sær tíð til yngru starvsfelagarnar, og geva sína vitan víðari.

Til síðst vil eg ynskja tær hjartaliga tillukku, og vónandi fært tú ein góðan dag.

**Vinur**

# Óli Olsen 60 ár

Í dag 14. september fyllir Óli Olsen á Argjum 60 ár. Óli er klaksvíkingur. Hann vaks upp í einum umhvørvi, har tosið mangan fall á útróður, fiskiskap og sigling, og eftir lokið realprógv í 1966 fór hann til skips og sigldi í nøkur ár.

Eftir at hava tikið stýrimansprógv í 1972 og skipsføraraprógv í 1973, fór hann út at sigla. Hann tók læraraprógv í 1987 og sama árið gjørdist hann lærari á Føroya Sjómansskúla.

Óli gavst sum lærari á sjómansskúlanum í 2000, tá hann fór undir forkanningar til at at skriva bókaverk um sjómansútbúgvingar frá elstu tíðum til okkara dagar. Sum úrslit av hesum arbeiði komu í 2003 og 2004 bøkurnar "Sigling & útbúgving" í tveimum bindum. Hann hevur eisini givið aðrar bøkur út sum t.d. "Tá ið rak við og ímóti", sum er um Fischer Heinesen. Hann er framvegis virkin á hesum øki og leggur síðstu hond á eitt verk, sum skal koma út næsta ár.

Óli hevur í mong ár verið ímyndin av einum sunnum rennara. Hann er limur í Bragdinum og er ofta at síggja til kappingar. Hann rann marathon á Oyggjaleikum í 1989 og var sostatt millum fyrstu marathonrennararnar í Føroyum. Í 1994 luttók hann í Holge Danske marathon í Helsingør við góðu tíðini 2 tímar og 54 min. Síðan hevur hann runnið trý Tórshavn Marathon, og tann 6. september í ár rann hann við sera góðu tíðini 3:32 og gjørdist FM í sínum aldursbólki og nr. 7 í opna bólkinum. Tað er neyvan ein kapping kring landið, har Óli ikki luttekur, og er hann ikki millum rennararnar, so er hann á síðulinjuni og stuðlar fyrireikarunum.

Í dag arbeiðir Óli fyri Almannastovuna sum stuðul hjá serliga krevjandi børnum.

Óli er giftur við Aase Bømler Olsen úr Roskilde, og tey eiga tvær døtur.

**- red**




## Tøkk

Familja mín og eg vilja fegin takka øllum,
sum á ein ella annan hátt mintust og sosatt
gleddu meg á føðingardegnum.
Takk fyri.

**Hensar Ellingsgaard**

### Dagurin

14. september. Dýrd krossins. Eisini róptur krossmessa um heystið. Krossurin, sum drotningin Helena fann, Kristi krossur, varð tikin og fluttur burtur av heidningum, men funnin aftur og førdur til Jerusalems. Dagurin hátíðarhildin til minnis um hesa hending. 14. september er eisini dagurin, tá ið atkvøðugreiðsla í 1946 var í Føroyum um samband við Danmark ella loysing.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*